

# Grand Mistral

Reiðarí: Iberojet, Skrásett: Spania, Bygt: 1998, Tons: 48.200
Ferðafólk: 1.700, Manning: 670, Longd: 219 metur, Breidd: 28.8 metur



Grand Mistral kemur á Havnina tvær ferðir í summar. Fyrstu ferð er 21. juli kl 13.00. Tey 1.650 ferðafólkini umborð eru sponsk og koma úr Bergen ávegis Reykjavík. Aðru ferð er 10. august kl 08.00 tá skipið er á veg úr Reykjavík til Bergen við 1.650 ferðafólkum.
Grand Mistral varð upprunaliga kallað fyri »Projekt J31« - skipið hevði onki reiðarí og var bygt upp á spekulatión. Fyrstu árini sigldi hon fyri Festival Cruises, men tá tað reiðaríið fór á húsagang í 2004 tók núverandi reiðaríið, Iberojet, yvir.



# Mein Schiff

Reiðarí: Tui Cruises, Skrásett: Malta, Bygt: 1996, Tons: 76.522
Ferðafólk: 2.681, Manning: 909, Longd: 260 metur, Breidd: 32.20



Mein Schiff kemur á Havnina 28. juli kl 07.00. Tey 1.750 ferðafólkini eru týsk og koma úr Reykjavík ávegis Invergordon í Skottlandi.
Mein Schiff er nýliga umdoypt, skipið hevur havt nøvnini Galaxy og Celebrity Galaxy frá 1996 til 2009 og siglt fyri reiðaríið Celebrity Cruises. Sjónvarpssendingin »The Cruise« í BBC varð spæld inn umborð á Mein Schiff. Tui eigur eisini Star Tours, ið nógv kenna frá ferðum sunnanfyri.



# Costa Luminosa

Reiðarí: Costa Cruises, Skrásett: Italia, Bygt: 2007, Tons: 92.700
Ferðafólk: 2.260, Manning: ?, Longd: 292 metur, Breidd: 32.30 metur



Costa Luminosa kemur á Havnina 18. august kl 08.00. 1.900 ferðafólk úr ymiskum londum eru við á ferðini frá Reykjavík til Invergordon í Skottlandi.
Skipið hevur eitt 3.500 fermetrar stórt spa í tveimum hæddum og kostaði 450 milliónir evrur at byggja. Skipið er júst afturkomið úr Persiska flógvanum, har tað hevur gjørt cruiseferðir millum Dubai, Muscat, Fujairah, Abu Dhabi og Bahrain.





# Eurodam

Reiðarí: Holland America Line, Skrásett: Niðurlond, Bygt: 2008, Tons: 86.273
Ferðafólk: 2.104, Manning: 929, Longd: 285 metur, Breidd: 32 metur



MS Eurodam kemur á Havnina 24. august kl 08:00. 1.900 ferðafólk úr ymiskum londum eru við á ferðini frá Orknoyggjunum til Reykjavík. Reiðaríið Holland America Line er eitt tað eldsta reiðaríið og hevur virkað í heili 136 ár.
Nú hevur reiðaríið 14 skip og siglur um allan heimin. Hetta mentaða ferðamannaskip hevur eina stóra samling av listaverkum umborð.





# Norwegian Sun

Reiðarí: Norwegian Cruise Line NCL, Skrásett: Bahamas, Bygt: 2001, Tons: 78.309
Ferðafólk: 1.936, Manning: 916, Longd: 258 metur, Breidd: 32 metur



Norwegian Sun kemur á Havnina 25. september kl 08.00. Tey 1.900 ferðafólkini eru amerkansk og koma úr Lervík ávegis Reykjavík. NCL er eitt av størstu cruise-reiðaríðunum í Norðurlondum við 11 skipum. Norwegian Sun og systurskipið Norwegian Star vóru bæði doypt samstundis í Miami.



# Grand Princess

Reiðarí: Princess Cruises, Skrásett: Bermuda, Bygt: 1998, Tons: 109.000
Ferðafólk: 2.590, Manning: 1.100, Longd: 289.86 metur, Breidd: 35.97 m



Grand Princess er størsta skip, ið kemur á Havnina í ár. Tað eru 2.300 amerkansk ferðafólk umborð, tá skipið leggur at 29. september. Leiðin gongur úr Lervk til Akureyri. Tá Grand Princess varð bygt í 1998, var tað dýrasta og størsta skip, ið nakrantíð var bygt. Kostnaðurin var 450 milliónir dollarar. Skipið siglur í Evropa um summarið og í Karibia um veturin.